# Eitt ordans feminist



*Lena L. Mohr, blaðstjórin á Kvinnu, og Elisabeth Møller Jensen, stjóri í KVINFO.*
*Lena L. Mohr var nøgd við tiltakið og takksom fyri, at so nógv fólk møttu upp.*
*Elisabeth Møller Jensen, hevur arbeitt við kynsgransking og javnstøðu í mong ár. Hon greiddi frá, hvussu tær í Danmark ítøkiliga vaktu durvandi donsku kvinnurøsluna til lívs aftur eftir sløvu áttatiárini. Eitt nú settu tær á stovn Kvindeligt Selskab, og var úrslitið eitt tiltrongt ættarliðsskifti í kvinnurørsluni. Hon hevði eina ørgrynnu av hugskotum til, hvussu vit kunnu bøta um ójavnan her á landi.*

**Einir fimmhundrað føroyskir nýfeministar vórðu óivað floygdir á Hotel Føroyum í gjár. 8. mars tiltakið var merkt av góðum hýri, mati, tónleiki og fyrilestrum, og samanumtikið vóru fólk sera nøgd.**

**8. MARS**
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens kr. Vang og Rigmor Dam*

Ein litføgur Brynhild Thomsen var orðstýrari á størsta kvinnutiltakinum av sínum slag nakrantíð.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, setti stevnuna, og fyrilestrahaldarar vóru Eyðgunn Samuelsen frá Demokratia, sum talaði um kvinnur í politikki. Elisabeth Møller Jensen viðgjørdi evnið: Javnstøða, ein samfelagsuppgáva!

Nógv høvdu sæð fram til at hoyra Benju Stig Fagerland, og roynir hennara við verkætlanini Female Future, og ikki vórðu fólk vónbrotin. Lena L. Mohr staðfesti og grundgav fyri, at vit hava ikki javnstøðu í Føroyum, og stuttliga endabrestin stóð Trine Gregorius journalistur fyri. Greiði og ikki minst viðkomandi boðskapur hennara var: Vit skulu taka ábyrgd fyri egnum lívi, og ikki lata onnur fólk seta dagsskránna.

## Nýggjur portalur

Nógvar kanningar vísa, at mannligir leiðarar vilja hava kvinnur í leiðsluna, men at torført er at finna røttu kvinnurnar. Aðrastaðni er vanligt við databasum yvir skikkaðar kvinnur, og á ráðstevnuni varð ein tílíkur portalur avdúkaður: www.kveik.fo. Tær tríggjar, Bjørt Samuelsen, Gunnvør Balle og Jeanette Joensen hava tikið stig til portalin, har til ber hjá kvinnum at skráseta seg við fakligum førleikum, royndum og áhugamálum. Stigtakararnir siga, at á Kveik.fo, sum letur upp 10. apríl, verður lætt at finna skikkaðar kvinnur til fjølbroyttar uppgávur – tað verið seg til nevndarsessir, netverk, størv, álitisstørv og annað.



*Tríggir gamlir reyðsokkar, Marianna Norðoy, Laura Joensen og Solveig Sørensen. Tær hava mangan verið mitt í rokanum til bæði kravgongur og happenings í sjeyti og áttatiárunum. Tær vóru sera nøgdar við tiltakið, og vístu á, at tá tær vóru í vælmaktini, vóru tað meira kenslurnar og aggressiónirnar sum stýrdu. Nú fer eitt tiltrongt ættarliðsskifti fram, hildu tær.*







